# Mylnuhúsið søkir eftir pedagogi

Søkt verður eftir Pedagogi til Mylnuhúsið, at byrja 1. februar ella skjótast tilber.

Mylnuhúsið er ein sjálvsognarstovnur frá 1999. Vit taka dagliga ímóti 66 børnum í aldrinum 0–9 ár. Í Mylnuhúsinum er pláss fyri at bæði børn og vaksin kunnu seta síni spor her. Vit arbeiða í tí dagliga við okkara eygleiðingarevnum og eru upptikin av, hvat upptekur børnini, fyri síðan at tilrættarleggja dagin út frá tí og leggja stóran dent á, at varða um øll børnini.

Vit sóknast tí eftir einum pedagogi, ið er:

- fleksibul
- hevur opið sinni
- sær møguleikar fram um mørk
- tekur støði í barninum
- tekur barnið í álvara
- er opin fyri nýhugsan
- leggur stóran dent á gott samstarv við foreldur og samstarvsfelagar.

Lønar- og setunarviðurskifti eru sambært sáttmálan millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Pedagogfelag.

Um ongin pedagogur søkir, verður hjálparfólk sett.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til leiðaran Hanna Thøgersen, telefon 457788, ella varaleiðaran Annie Joensen, telefon 217788.

Umsóknir til starvið, saman við upplýsing um útbúgving og royndir skulu vera okkum í hendi, seinasta lagi 22. januar 2001.

**Mylnuhúsið**
Mylnugøta 10
700 Klaksvík

# Til sølu



**M/S BRATTANES, TN 460, 24,38 BRT.**

Høvuðsumvældur í 1999. Nýtt stýrhús, 260 hk MAN diesel, 6 el-snellur. Fiskiloyvi 4A umframt bankaloyvi. Fleiri upplýsingar fáast frá Victor Nielsen, tlf. 455522 ella 281522.

Föroyabók
***Skrásett grannskoðaravirki***
Vágstún 2
FO-700 Klaksvík

**Toll- og Skattstova Føroya**
**Stýrið**

# Fyribilsskráseting 2001

Fyri at fyribilsskatturin kann verða rætt roknaður, mugu tær upplýsingar, vit hava skrásett um B-inntøkur og frádráttir, vera rættar.

**B-inntøkur**
Skatturin í 2001 verður roknaður út frá upplýsingunum um B-inntøku á sjálvuppgávuni 1999.

Um ein B-inntøka er broytt í 2000, verða broytingarnar tiknar við í fyribilsskattaskránna 2001.

Upplýsingar um B-inntøkur eru upplýstar á konto-avritinum, sum verður sent út miðskeiðis í januar 2001.

**Frádráttir**
Neyðugt er hjá øllum, ið ynskja møguligar frádráttir roknaðar við, at upplýsa okkum um, hvørjar frádráttir tey hava.

**DIS-skipanin**
Persónar, sum fara at sigla undir DIS-skipanini, og persónar, sum eru undir DIS-skipanini, men ikki hava boðað frá hesum, eiga at boða Toll- og Skattstovuni frá, so upplýsingarnar, vit skráseta fyri 2001, eru rættar.

**Rættingar/fráboðanir**
Oyðubløð til at rætta ella skráseta B-inntøku, boða frá frádráttum ella sigling undir DIS-skipanini fáast á Toll- og Skattstovuni, í peningastovnum og á posthúsum.

Allir skattaborgarar eru altíð vælkomnir á økisskrivstovurnar hjá Toll- og Skattstovuni at fáa upplýsingar um, hvørjar skrásetingar um teirra skattaviðurskifti, Toll- og Skattstovan hevur.

# Floksformansval

Sum fráboðað verður floksformansvalið og val av varamanni hansara í Havn í

**B-36 húsinum**
**leygardagin, tann 13.01.01 kl. 15.00**

Aftaná verður politiskt kjak o.a.

**Landsfelag Sjálvstýrisfloksins**

# Bakaralærlingur

Vit søkja eftir einum lærlingi at byrja skjótast gjørligt. Áhugað kunnu venda sær til:

**Tlf. 44 43 88** ella **22 02 30**

BREYÐMOLIN
FO-530 Fuglafjørður. Tlf./Fax. 44 43 88

# Listastevnan/ Føroyskir Yrkisfotografar

## Fotokapping

Í sambandi við Listastevnuna 8.–19. august bjóðar Listastevna Føroya/Føroyskir Yrkisfotografar til norðurlendska fotokapping fyri yrkisfotografar.

**Evni**
1. **Portrett/Brúdleyp**
2. **Reklama**
3. **Frítt evni**

Fotomyndirnar skulu vera: **40 x50 cm** festar á stívt kartong.

**Í mesta lagi 5 fotomyndir fyri hvønn luttakara!**

Føroysku luttakararnir skulu lata myndirnar inn til Føroyskar Yrkisfotografar v/ Jørgen Lützen, Sjúrðargøtu 8, Tórshavn, í seinasta lagi 1. juli.

1. vinningur: Ein ferð fyri 2 til Danmarkar við uppihaldi.

Vinnarin av fotokappingini verður kunngjørdur, tá ið Listastevnan verður sett 8. august.

**Dómarar:**
1. **Arne Kaade, Stavanger**
2. **Keld Nielsen, Holstebro**
3. **Knud E. Jensen, Thy**
4. **Metha Andersen, Haderslev**
5. **Ulla Jensen, Mikkelfart**

Fotoframsýningin verður frá 8.–31. august á ***Føroya Landsbókasavni***. Tey, sum vitja framsýningina, fáa høvi at velja bestu myndina. Eykavinningur.

**Luttakaragjald:**
**500,- kr. fyri hvønn luttakara**
**(250,- kr. fyri sveinar og lærlingar)**

Listastevnan/Føroyskir Yrkisfotografar skila sær rætt til at brúka fotomyndirnar til fjølmiðlakunning og katalog.

Tilmeldingarskjal kann fáast á heimasíðuni hjá Norðurlandahúsinum www.nlh.fo ella frá Norðurlandahúsinum, **tlf. 317900.**

**Listastevnan**
**Norðurlandahúsið í Føroyum**
Norðari Ringvegur
Postsmoga 1260
110 Tórshavn

ADC-Heilsølan
Láarvegur 14 - Tórshavn - Tlf. 315828 - Fax 315893
ARBEIÐSHANDSKAR
Til øll endamál – bæði á sjógvi og landi
LANDSINS STØRSTA ÚRVAL
frá eingangshandskum til fóðraðar japan-handskar
ADC
BEINLEIÐIS FRÁ FRAMLEIÐARA



**Toll- og Skattstova Føroya**
**Stýrið**

# Automatisk sjálvuppgáva 2000

Um 15. februar skrivar Toll- og Skattstovan eina skattauppgerð út til persónar, vit meta okkum at hava rættar upplýsingar um í fyribilsskattaskránni.

Tey, sum fáa skattauppgerð á henda hátt, eru persónar undir fullari skattskyldu, og sum í fyribilsskattaskránni 2000

bert hava A-inntøku
og
ikki hava frádráttir
og
ikki sjálvboðin hava ávíst løn gjøgnum skattaskipanina
og
ikki hava eitt persónligt vinnuvirki.

Hesi hava tó skyldu at lata inn sjálvuppgávu, um so er, at upplýsingarnar á skattauppgerðini, tey fáa, ikki eru rættar.

Tey, ið ikki hava annan frádrátt enn eftirlønartrygging, og sum annars lúka omanfyrinevndu treytir, kunnu fáa automatiska sjálvuppgávu/skattauppgerð, um tey innan 1. februar 2001 lata Toll- og Skattstovuni sjálvuppgávu yvir inngoldnað eftirlønartrygging í 2000.
**Skjalprógv skal viðleggjast.**

Sjálvuppgávur fáast á Toll- og Skattstovuni.

---

**Ognaruppgerð**
Tað er bert neyðugt at lata inn ognaruppgerð, um broytingar eru í ogn og skuld í mun til 31. desember 1999.
Tó skulu tey, sum Toll- og Skattstovan sendir ognaruppgerð til, lata hana inn aftur.

**Toll- og Skattstova Føroya**

Starv

# Fólkaflutningsleiðari

Ein av stóru avbjóðingunum hjá Strandfaraskipum Landsins er at hækka tænastu- og góðskustøðið innan fólkaflutningin. Í hesum sambandi verður søkt eftir einum leiðara til fólkaflutningsdeildina (Oyggjaleiðir og Bygdaleiðir).

Tað er ynskiligt, at tann, sum settur verður kann byrja skjótast gjørligt.

## Uppgávurnar hjá fólkaflutningsdeildini

Fólkaflutningsdeildin skal veita eina úrslitagóða fyrisiting innan fólkaflutningstænastu, herundir samskipa, viðlíkahalda og menna stýringina innan fólka- og akfarsflutningin hjá fyritøkuni.

Virksemið á deildini fevnir um hesar høvuðsfunktiónir:

- Planlegging
- Rakstur (skip og bussar)
- Ferðslusamskipan
- Ferðaseðlasamskipan

Fyristandandi uppgávur:

- Uppbyggja góðskustýringarskipanir
- Uppbyggja bíleggingarskipanir á ávísum økjum
- Menna ferðaseðlaskipanina
- Endurskoða prísskipan og príspolitikk
- Langtíðarferðaætlan
- Uppbyggja hagtalsskráir fyri samferðslu
- Fyrireika útbjóðingar av rakstraruppgávum.

## Uppgávurnar hjá leiðaranum

Fólkaflutningsleiðarin skal definera uppgávur, málsetningar og strategiir fyri fólkaflutningstænastuna og skal tryggja, at tær verða settar í verk.

Leiðarin skal tryggja ein effektivan og handilsligan rakstur, og somuleiðis áseta og stýra fíggjarligu karmunum innan tænastuframleiðsluna.

Leiðarin skal harafturat menna flutningsmøguleikar og tryggja optimering av tænastuframleiðsluni við nýtslu av nútímans tøkni.

Tænastuframleiðslan krevur motivatión og luttøku frá starvsfólkunum, og krevur hetta tætt samskifti millum leiðara og starvsfólk.

Aðrar uppgávur hjá leiðaranum:

- Undirvísing og fakliga menning av starvsfólkunum á deildini og úti á rakstrareindunum
- Mánaðarligar frágreiðingar um virksemi og ætlanir
- Fíggjar- og íløguætlan innan fólkaflutningsøkið
- Viðmæla starvssetanir innan fólkaflutningsøkið.

## Førleikakrøv

- Vinnu- og handilsútbúgving frá hægri lærustovni, verkfrøðingur e.l.
- Kunnleiki og royndir viðvíkjandi flutningsskipanum
- Kunnleiki og royndir innan edv á høgum brúkarastøði
- Royndir í projektleiðslu
- Málrættaður og arbeiðir analytiskt
- Góð leiðslu- og samstarvsevni
- Góð evni at orða seg bæði skrivliga og munnliga á føroyskum, donskum og enskum.

## Setanartreytir

Talan er um eitt leiðarastarv við stórum og spennandi avbjóðingum, har leiðarin fær ábyrgdina av at menna eina týdningarmiklað funktión. Starvið gevur góðar møguleikar fyri persónligari og fakligari menning.

Starvið verður sett sambært avtalu, og er lønt í 35. lønarflokki sambært tænastumannalógini, tó uttan at starvið er tænastumannastarv. Eftirlønartrygging fylgir við starvinum.

## Umsóknir

Umsókn við próvskjølum skal sendast til:

***Strandfaraskip Landsins***
att. Starvsfólkadeildin
Boks 88
FO-110 Tórshavn

og skal vera fyritøkuni í hendi í seinasta lagi 5. februar 2001. Um tú ynskir nærri upplýsingar, kanst tú ringja til Reidar Nónfjall, stjóra.

Tlf. 34 30 00 ella e-postur: ren@ssl.fo.

*Høvuðsuppgávan hjá fyritøkuni er at lúka landsins tørv á innanlanda fólka- og farmaflutningi, og skal fyritøkan í so stóran mun sum gjørligt rekast á handilsligum støði. Fólka- og farmaflutningurin setir stór krøv um eina góða kundatænastu, herundir trygd, reglusemi og skjótleika.*

*Árliga rakstrarætlanin hjá Strandfaraskipum Landsins javnvigar við yvir 100 mió. kr. Talið á starvsfólkum svarar til 180 fulltíðarstørv, herav umleið 155 operatørar. Talið á flutningsanleggum er 12 skip, 40 bussar og 15 lastbilar. Flutningsuppgávurnar fevna um alt landið.*

STRANDFARASKIP LANDSINS

# Kollafjarðar Kvøldskúli

Umframt áður lýstu skeið verður undirvíst í

**Matgerð** (heilsukostur) mikukvøld kl. 18.00–21.30
Undirvísari: Edna Einarsson, **tlf. 421289**

Um nóg nógv tekna seg, verður byrjað mikudagin 17. januar.

Undirvísingin er treytað av nóg góðari undirtøku og góðkenning myndugleikanna.

Nærri fæst eisini at vita hjá leiðaranum, tlf. 421475.

**Kollafjarðar kvøldskúli**

Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
-tað loysir seg



GRAVSTEINAR OG KANTSTEINAR.
NÚ EISINI ÚR FØROYSKUM GRÓTI

Sosialurin - 311820

Prísir við litmyndum verða sendir kring landið og til útlandið

Til útisetar í Danmark
**Vit kunnu seta gravsteinar upp í Danmark uttan eyka kostnað**



Danstein
Gravsteinar, kantsteinar og blómubeð

Skjót levering

Tel. 318323
Tel. 447512
Tel. 217512
Fax 449961

RUNAVÍK - R. C. EFFERSØESGØTA 19, TÓRSHAVN
www.danstein.fo